# Sáttmáli

millum

## Rithøvundafelagið og Nám

um samsýningar

**Innihald**


1. Sáttmálavavið
2. Innihaldsliga grundarlagið
3. Fíggjarliga grundarlagið
4. Umbiðið nýskrivað upprunatilfar
5. Umbidnar týðingar
6. Rættindi at nýta upprunaverk í útgávum hjá Námi
7. Serstakur sáttmáli
8. Tíðarskeið


### §1 Sáttmálavavið

Hesin sáttmáli er galdandi fyri allar rithøvundar, ið gera umbiðið og nýskrivað tilfar. Stk. 2 Nám ger eisini sáttmálar við t.d. lærarar, har teir fáa tímaniðurskurð við løn úr Námi. í hesum føri verður rithøvundurin verkætlanarsettur. Hesin er undantikin hesum sáttmála.

### §2. Innihaldsliga grundarlagið

Grundarlagið í vavi er byrjað normalsíða á 2.000 maskinsløg fyri fagurbókmentaligar tekstir og yrkisbókmentaligar tekstir, og 32 ørindalinjur í yrking ella líknandi.

Grundarlagið fíggjarliga er tikið úr sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Lønardeildina.

### §3. Fíggjarliga grundarlagið

| | | |
|---|---|---|
| Vikartímatakstur /2: | kr. 408,15 /2 = 204,08 | (1/10-2023) |
| Vikartímatakstur: | kr. 408,15 | (1/10-2023) |
| Grundtakstur: | kr. 2000,00 | |

Eftirlønargjald er íroknað hesar takstir og verður avroknað sambært galdandi lóg.

Taksturin "Vikartímatakstur" fylgir nevnda sáttmála.

### §4. Umbiðið, nýskrivað upprunatilfar

| | |
|---|---|
| Grundtakstur: | kr. 2000,00 |
| Normalsíða: | kr. 408,15 |

*Vavið ásett sambært grein 2.*

**§5. Umbidnar týðingar**

| | |
|---|---|
| Grundtakstur: | kr. 2000,00 |
| **Fagur- og yrkisbókmentaligur tekstur** | kr. 204,08 fyri normalsíðuna |
| **Yrking** | kr. 408,15 fyri normalsíðuna |

*Vavið ásett sambært grein 2.*

**§6. Rættindi at nýta upprunaverk í útgávum hjá Námi**

| | |
|---|---|
| **Fagur- og yrkisbókmentaligur tekstur** | kr. 204,15 fyri normalsíðuna |
| **Yrking** | kr. 408,15 fyri normalsíðuna |

*Vavið ásett sambært grein 2. Tó er minsta gjaldið altíð kr. 500.*

**§7 Serstakur sáttmáli**

Í hvørjum einstøkum føri, verður serstakur sáttmáli gjørdur millum rithøvund og Nám. Hesin sáttmáli útgreinar innihaldsliga og fíggjarliga vavið grundað á henda sáttmála.
Stk. 2. Í minsta lagi 6 ár eftir at verkið er útgivið, kunnu partarnir krevja, at serstaki sáttmálin verður dagførdur. Kunnu partarnir ikki semjast, kann serstaki sáttmálin uppsigast við 3 mánaða uppsagnarfreist.
Stk. 3. Tey, ið eru nevnd í § 1 stk. 2. eru ikki fevnd av § 7 stk. 2.

**§8. Tíðarskeið**

Sáttmálatíðarskeiðið er 3 ár galdandi frá 1. januar 2024 til 31. desember 2026.

Tórshavn 5. mars 2024

Sámal Soll
**Rithøvundafelagið**

Rithøvundafelag Føroya

**Nám**

NÁM